

*Soleiðis fer nýggi Miðnámsskúlin í Vági at taka seg út. Hann er feldur inn í lendi og tí er framsíðan ikki serliga stór, Summi av hølunum eru bygt innumdir lendið niðaneftir og tey fáa ljós úr teimum stóru vindeygunum í loftinum*

# Ein savnandi kraft í Suðuroy

**Nýggi Miðnámsskúlin, sum skal byggjast í Vági, skal vera ein virkin partur av samfelagnum og geva møguleikar fyri at binda saman undirvísing, mentan, arbeiðslív og vinnulív í Suðuroy**

PROJEKTKAPPING
*Áki Bertholdsen*

Nýggi miðnámsskúlin, sum ætlanin er at byggja í Vági, skal ikki bara vera ein tíðarhóskandi karmur um fjølbroytt og framkomin útbúgvingartilboð til ung og tilkomin. Tá ið Mentamálstýrið í september í ár útskrivaði projektkapping um skúlan, varð dentur eisini lagdur á, at hann skuldi hava umstøður til at gerast ein virkin partur av samfelagnum og at gera tað møguligt at binda saman undirvísing, mentan, arbeiðslív og vinnulív í Suðuroynni.

Talan var sostatt um eina kapping, ið leggur dent á at skapa karmar um ein framtíðar skúla, sum verður øðrvísi enn vanligu miðnámsskúlarnir hava verið.

Hann skal vera ein savnandi kraft í Suðuroynni, tí hann skal kunna hýsa nógvum og fjølbroyttum arbeiðsháttum og vera opin fyri skiftandi læring í flokkum og bólkum og samstundis skal hann geva tí einstaka næminginum góðar møguleikar fyri at læra sjálvur og at leita sær vitan og førleikar.

Men skúlin skal samstundis vera ein opin og virkin partur í tí samfelagi, hann er í og hetta setur stór krøv til bygningin, tí hann skal kunna laga seg til skiftandi tørv og umstøður, ið støðugt broytast.

Dómsnevndin vísir eisini á, at landslagið, har skúlin skal byggjast, er serstakt og krevur serstakt varsemi og fyrilit fyri umhvørvi, náttúru og veðurlagi.

Talan er tí um eina kapping, sum setir luttakarunum stór krøv, sigur dómsnevndin, sum er Óli Holm, landsstýrismaður, formaður, Jógvan Krosslá, býráðsformaður, Ole Laursen, deildarleiðari á miðnámsskúlanum í Vági, Turið Nolsøe Mohr, arkitektur og Lasse Hagerstrøm, arkitektur úr Finnlandi.

### Tríggjar virðislønir

Lætnar vórðu tríggjar virðislønir. Fyrstu virðisløn upp á 100.000 krónur, fingu arkitektarnir, Árni Winther, Rúni Abrahamsen, Páll Lave og Pauli Dam Joensen fyri vinnaraprojetkið, sum er umrøtt aðrastaðni. Aðru virðisløn upp á 60.000 krónur fingu arkitektarnir Heidi Hjalgrímsdóttir Poulsen, Marita Weihe. Armgarð Weihe og Johan Laksafoss fyri tað næstbesta projektið og triðju virðisløn upp á 25.000 krónur fekk Eyðun Eliassen.

Men harumframt samtykti dómsnevndin eisini at keypa tekningarnar frá Albert Isfeld fyri 15.000 krónur.

Á samkomuni, sum var, tá ið vinnarin var avdúkaður, heitti Mads Winther, stjóri á Føroya Studentaskúla, staðiliga á Mentamálastýrið um at fáa byggisáttmálan undirskrivaðan, áðrenn løgtingsvalið í vár, tí tað kann fáa ávirkan á tað politiska landsslagið.

# Royna nýggja byggilist í Vági

**Mánadagagin varð avdúkað, hvør hevur vunnið kappingina um at tekna nýggja miðnámsskúlan, sum skal byggjast í Vági. Dómsnevndin sigur, at tekningin sum vann, er eitt sterkt hugskot í skapi og innihaldi**

ARKITEKTAKAPPING
*Áki Bertholdsen*

– Ístaðin fyri at taka skúlan burturúr lendinum, er hann feldur inn í tað.

Tað var tann grundleggjandi tankin hjá teimum fýra arkitektunum, Árna Winther, Rúna Abrahamsen, Páll Lave og Pauli Dam Joensen, tá ið teir settust við tekniborðið at tekna nýggja miðnámsskúlan, sum ætlanin er at byggja í Vági.

Í september útskrivaði Mentamálastýrið projektkapping um at gera uppskot til tann nýggja miðnámsskúlan, sum skal byggjast í Vági.

Dómsnevndin fekk 12 uppskot at velja ímillum og henni dámdi uppskotið hjá teimum fýra arkitektunum so væl, at teir vunnu kappingina og fingu 1. virðislønina upp á 100.000 krónur.

Dómsnevndin sigur, at uppskotið, sum vann, er vakurt framlagt, og er bæði einfalt og sermerkt ísenn Tað er eitt sterkt hugskot í skapi og innihaldi og hevur eina skipan, sum er ógvuliga greið og samstundis gevur ríkar og fjølbroyttar byggilistarligar upplivingar.

Atgongdin og tilkoyringin til skúlan er natúrliga lagt á sléttara partin av grundstykkinum, omanfyri húsið og tað víkir frá øðrum uppskotum.

Tó heldur nevndin, at vegurin kann vera trupul at gera, men hon heldur eisini, at hann kann leggjast øðrvísi, uttan at nerva heildina munandi.

Úr erva slepst inn í húsið, tvs, at inngongdin er niður í húsið ígjøgnum eina forhøll í tveimum hæddum, sum greitt býtir frá tey høli, sum skulu brúkast til almenn endamál hjá øðrum enn skúlanum sjálvum.

Dómsnevndin heldur kortini, at inngongd eigur at vera úr neðra eisini til tey, sum eru til gongu.

Nevndin hugsar eisini um aðrar broytingar, sum hon skal tosa við arkitektarnar um, kemur tað hartil,at skúlin verður bygdur.

Men høvuðsætrlanin er væl førd ígjøgnum og gevur eitt tvíbýti innan, greitt skilt sundur soleiðis, at spennandi, rúmligir mótsetningar møtast við einum ovara parti, sum hevur ljós úr erva. Hesin partur er lagdur inn í lendið.

– Bygningurin er væl skipaður og rúmliga samansetingin framútskarandi. matarhøllin við útiøki er einastandandi væl løgd.

### Ikki roynt fyrr

Verður skúlin bygdur verður talan um byggilist, sum er nýggj í Føroyum.

– Ístaðin fyri at taka seg burturúr lendinum, er bygningurin feldur inn í lendið, sigur Gunnar Hoydal, sum var skrivari hjá dómsnevndini.



*Hetta eru teir fýra arkitektarnir, sum vunnu kappingina um at tekna nýggjan miðnámsskúla í Vàgi. Teir eru f.v. Páll Lave, Pauli Dam Joensen, Rúni Abrahamsen og Árni Winther*

Hetta er gjørt á ein hátt, sum ikki er roynt fyrr í Føroyum.

Tað sæst aftur í bygningunum, tí framsíðan á húsinum er ikki stór. Hinvegin eru nógv høli í skúlanum bygt inn í lendið, niðaneftir, har ljósið kemur niður úr erva ígjøgnum vindeygu í loftinum.

Umframt at vera miðnámsskúli, skal hann eisini hava skeiðstilboð til stóran part av fólkinum. Hann hevur bæði matarhøll og samkomuhøll, so at tað ber til at hava mentanartiltøk av alskyns slagi í honum.

Í samstarvi við kommuna, verður eisini bókasavn í skúlanum.

Óli Holm, landsstýrismaður sigur bygingin byrjar komandi ár og at hann verður liðugur í 2005.

Talan er um ein bygning av træi, gróti, flagi og glasi, er er kent byggitilfar í Føroyum, í hesum førinum tó lagt í ein nýmótans bygning.

– Vit eru samdir um, at tað gamla er gott og at tað vilja vit varðveita, segði Árni Winther, tá ið hann fekk virðislønina vegna teir fýra arkitektarnar, sum vunnu.

Men hann legði afturat, at tað er ikki altíð at vit hugsa so nógv um, at tann arvur, vit lata eftirkomarum okkara, er tað, sum teir skulu stríðast ta næstu øldina.

Tí helt hann, at tað hevur stóran týdning, at hugsa um, at tað, vit lata úr hondum, eisini skal vera til gagns hjá teimum, sum eftir okkum koma.



# Annfinn væntar samanlegging

**Annfinn Brekkstein væntar, at Kirkjubøar kommuna verður løgd saman við Tórshavnar kommunu einaferð í framtíðini. Fyri fyrst hevur bygdaráðið tó valt samstarv við at søkja um limaskap í Kommunusamskipan Føroya, har tær størru kommunurnar eru limir**

KOMMUNUR
*Stefan í Skorini*



*Annfinn Brekkstein metir, at fleiri kommunur eru á veg úr kommunufelagnum inn í Kommunusamskipan Føroya við teimum størru kommununum*

Kirkjubøar kommuna hevur søkt um limaskap í Kommunusamskipan Føroya, ið umboðar 67% av fólkatalinum, men bara seks kommunur. Samstundis hevur hon tikið seg úr Føroya Kommunufelag, sum ikki megnaði at røkja hennara áhugamál til fulnar.

– Vit hava betri umboðan í KSF enn í kommunufelagnum, og vit standa sterkari í tí felagsskapinum. Soleiðis kunnu vit víðka samstarvið við størru kommunurnar enn meira, sigur Annfinn Brekkstein.

Hann vil vera við, at kommunufelagið als ikki megnaði at fylgja við og røkja teirra áhugamál. Tí heldur hann, at kommunufelagið skuldi tikið upp samráðingar við KSF um limaskap. Úrslitið hevði verið eitt kommunufelag í landinum, sum er øllum at gagni.

Hann heldur, at kommunusamskipanin hevur størri førleika enn kommunufelagið. Og tá stórar avbjóðingar og tungar byrðar eru fyri framman hjá kommununum, stendur ein lítil kommuna seg betri í samstarvi við tær størru. Her verður m.a. sipað til barnaansing og eldrarøkt.

– Tann minna kommunan fær altíð meira burturúr einum samstarvi við eina størri kommunu, sigur Annfinn.

Kirkjubøur, Velbastað og Syðradalur hava longu umfatandi samstarv við Tórshavnar kommunu, og ætlanin er at víðka hetta samstarvið.

– Tær smáu kommunurnar hava ongan møguleika at taka ábyrgd av eitt nú eldraøkinum og øðrum, ið landið fer at leggja út, og tí mugu vit dúva uppá Tórshavnar kommunu, sigur borgarstjórin.

### Fyri samanlegging

Annfinn Brekkstein heldur, at nýggja kommunulógin leggur upp til, at kommunur verða lagdar saman í størri eindir.

– Lógin skuldi verið gjørd soleiðis, at kommunurnar vórðu noyddar til samanleggingar, men tað verður ikki sagt beinleiðis í lógini, sum tó bara er gjørd til størri eindir, sigur borgarstjórin.

Hann ivast ikki í, at Kirkjubøar kommuna verður løgd saman við Tórshavnar kommunu einaferð í framtíðini, tí eingin ivi er um, at hetta er ynskið hjá landsins myndugleikum, og hesum tekur hann undir við. Tó hevur bygdaráðið ikki viðgjørt henda spurningin ítøkiliga enn.

Eitt triðja kommunufelag er við at taka seg upp, og tað er samstarv millum útoyggjar, ið hevur ætlanir um at seta eina skrivstovu á stovn.

Annfinn Brekkstein metir ikki, at hesum felagsskapi er lív lagað, tí hvaðani skulu pengarnir koma frá, spyr hann.

### Fleiri kommunur á veg inn

Hann avdúkar samstundis, at fleiri kommunur fara at søkja um limaskap í KSF. Hetta er greitt, eftir at Kirkjubøar kommuna hevur søkt um limaskap.

Tí kunnu vit vænta, at fleiri kommunur fara at venda kommunufelagnum bakið, sum harvið fer at missa bæði styrki og førleika.

Tað er hetta, sum fær Annfinn Brekkstein at halda, at best hevði verið, um bara eitt kommunufelag er í Føroyum.

# Mykines lokkar barnafamiljur



*Katrina Johannesen, borgarstjóri í Mykinesi, sigur, at tey hava hækkað barnafrádráttin fyri at lokka ungar barnafamiljur til bygdina*

**Mykines er tann kommunan, ið hevur ásett størstu broytingina í barnafrádráttinum. Í ár er hann 1.500 krónur, men næsta ár er hann øktur til 6.000 krónur. Hetta er fyri at lokka ungar barnafamiljur út til oynna, sigur borgarstjórin**

BARNAFRÁDRÁTTUR
*Stefan í Skorini*

Tvær kommunur í Føroyum hava ein barnafrádrátt á 6.000 krónur. Tær eru Gjáar og Mykinesar kommuna, ið royna at lokka ungar barnafamiljur til bygdirnar.

Mykinesar kommuna hevur hækkað barnafrádráttin við heili 4.500 krónum, úr 1.500 uppí 6.000 krónur.

– Vit hava valt at hækka barnafrádráttin munandi, og tað er fyri at lokka ungar barnafamiljur út til Mykinesar, sigur Katrina Johannesen, ið er borgarstjóri í Mykinesi við einum bygdaráði, sum hevur tríggjar limir.

– Vit vilja so ógvuliga fegin hava eina aðra familju út higar at búgva, bæði fyri børnini og fyri okkum. Vit hava tí hækkað barnafrádráttin, so eingin skal hava tað at finnast at, um tey ætla sær at flyta út, sigur hon.

Hon torir tó ikki at vænta, at onkur fer at taka stigið at flyta út á eina útoyggj, hóast hon innarliga vónar hetta.

### Skatturin tann sami

Bygdaráðið hevur tó ikki lækkað skattin, sum tey við Gjógv hava gjørt. Skattaprosentið í Mykinesi er framvegis 16%, og við Gjógv er tað bara 13%.

– Vit hava valt ikki at lækka skattin, tí vit vilja framvegis hava nakað inn í kommunukassan, so vit kunnu gera tað, sum krevst í bygdini, sigur Katrina Johannesen.

Hon eigur tvey børn, ið eru tey einastu í bygdini.

### Stórar ætlanir

Maður Katrinu er Esbern í Eyðansstovu, og hann hevur saman við einum samstarvsfelaga ein dunnufarm úti í Mykinesi.

Har hava teir havt 500 dunnur gangandi til jólar. Nú eru 400 dunnur slaktaðar, og tær eru sendar á tann føroyska marknaðin. Tær flestu eru seldar heilsøluni hjá Poul Michelsen, meðan nakrar eru seldar privat.

Hetta er fyrsta árið, at dunnufarmur hevur verið úti í Mykinesi, og tað hevur eydnast væl, frætta vit.

Teir hava roynt at fara undir grísahald úti á oynni, men stuðul fekst ikki frá landinum, so tær ætlanirnar eru fyribild lagdar til viks. Eisini hevur talan verið um at fara undir aling, men hetta krevur stóra fígging, og hetta er ikki fingið uppá pláss enn, men tó eru ætlanirnar ikki gloymdar.

Tey royna, hvat tey kunnu fyri at halda lív í bygdini Mykinesi.


